# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 9. desember 2009


## Kyndil-H71 21-22 (10-11):

# H71 aftur í finalustríðið

**Meistararnir úr Hoyvík eru aftur partur av FM-dystinum. Sigurin móti Kyndli ber við sær, at H71 nú bert er eitt stig frá finaluplássinum**





Jákup Mørk


Hóast tað enn er langt eftir á mál í dystinum um finaluplássini í hondbóltskappingini, so var dysturin í gjár ein serstakliga týðandi uppgerð á vegnum.

Sum meistarar hevur H71 sjálvsagt mál um, at teir aftur hesa ferð skulu verða partur av FM-finaluni, men úrtøkan hevur ikki staðið heilt mát við vónirnar. Og sum avleiðing av hesum valdi annar av venjarunum fyri stuttum at taka seg úr sessinum.

Hjá Kyndli hevur tað í sínum lag heldur ikki gingið heilt eftir vild, men tapið hjá StÍF sunnudagin bar við sær, at báðir partar í gjár kundu ota seg heilt fram í oddastríðið aftur.

### Lág leikferð

Tí var spenningurin undan dystinum týskvøldið øgiligur, men tað var ikki í øllum brøgdum, at hetta sást aftur á vøllinum.

Spenningurin var støðugt stórur, tí munurin á máltalvuni var somikið lítil, men intensiteturin og leikferðin hava mangan verið hægri í dystum millum Kyndil og H71.

Hiemaliðið byrjaði betur, men eftir fyrsta lítla korterið tóku hoyvíkingarnir yvir. Teir otaðu seg framum, og uttan at talan nakran tíð gjørdist um veruligt stórspæl, so hildu teir Kyndil aftan fyri seg restina av dystinum.

Við sigrinum er H71 nú av álvara komið aftur á slóðina, nú munurin upp til StÍF á øðrum plássi bert er tað eina stigið.

Hinvegin er munurin niðureftir heldur ikki tann stóri. VÍF, sum er á aftasta plássinum hevur seks stig, og tí er talan framvegis um støðu, har hvør einstakur dystur hevur mest sum óhugnaligan týdning fyri í øllum førum fimm av teimum seks liðunum í deildini.



**Gunnar Bláberg úr H71 hevur her eitt sera gott tak á Bárði Johannesen úr Kyndli. Tá avtornaði var H71 eisini omaná, soleiðis at teir framvegis eru sera væl við í stríðnum um finalupláss**
Mynd: Álvur Haraldsen

## FAKTA

**Kyndil-H71 21-22 (10-11)**
**10 min:** 4-4
**20 min:** 7-7
**40 min:** 14-16
**50 min:** 16-17
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Høgni Klein 7, Josef Abrahamsen 4, Janus Einar Sørensen 3, Bárður Johannesen 2, Hans Áki Dal-Christiansen 2(1), Rúni Johansen 1, Høgni Klein-Olsen 1, Julian Johnsson 1
**H71:** Janus Sørensen 7, Poul Kjartan Dam 5, Dánjal Tórgarð 4, Hans Kári Hansen 2, Gunnar Bláberg 1, Bárður Brimvík 1, Rúni Højgaard 1, Rógvi Sørensen 1
**Brotskøst:** Kyndil 1, H71 2
**Útvísingar:** Kyndil 1, H71 4
**Dómarar:** Kári Hansen & Sámal Paulason.

### Hondbóltur

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 290 | 244 | 46 | 14 |
| 2 StÍF | 9 | 5 | - | 0 | - | 4 | 248 | 252 | -4 | 10 |
| 3 H71 | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 226 | 225 | 1 | 9 |
| 4 Kyndil | 9 | 4 | - | 0 | - | 5 | 230 | 245 | -15 | 8 |
| 5 KÍF | 9 | 3 | - | 1 | - | 5 | 219 | 251 | -32 | 7 |
| 6 VÍF | 9 | 3 | - | 0 | - | 6 | 264 | 260 | 4 | 6 |

# Rok um hálvfinalur

**Í steypakappingini verður brakið millum Tjaldur og Stjørnuna longu í hálvfinaluna, men longu undan dystinum er rok, tí Tjaldur noktar at spæla fyri jól**





Jákup Mørk


Við at áseta fyrru hálvfinaluna í steypakappingini hjá kvinnum til 19. desember hevur HSF ikki fylgt teimum reglum, sum eru ásettar fyri Coca Cola-kappingina.

Tað er greiða niðurstøðan hjá Tjaldri, sum nú hóttir við als ikki at møta upp til nakra hálvfinalu.

Í skrivi til Hondbóltssambandið hevur formaðurin í Tjaldri boðað frá, at ein samtykt íá limafundi ásetur, at fyrru hálvfinalurnar skulu spælast annað jólakvøld, og at hendan samtyktin eisini er staðfest av Kappingarnevndini í skrivi tann 6. desember.

- Hondbóltsfelagið Tjaldur skal hervið boða frá, at felagið ikki spælir nakran dyst 19.12.09 í Coca-Cola-kappingini. Um fyrri dysturin ikki verður spældur 26.12.09, sum var samtykt á limafundi, fara vit at heita á HSF, um at halda seg til Coca-Cola Cup forskriftirnar, sum eru at lesa á heimasíðuni hjá HSF, stendur í teldubrævinum, sum Eivind Jacobsen, formaður hjá Tjaldri, hevur sent HSF.